## Leivur um útlendinga-politikkin

– Tað er fínasta slag, at útlendingar koma til landið. Eg haldi tó, at útlendingar, sum koma til Føroya, skulu hava ein serkunnleika. Tað kann til dømis gerast ein tíðaravmarkaður sáttmáli, sum vit síggja við pólsku sveisarunum á Skála. Tað er tó ofta ov tvørligt at fáa uppihaldsloyvi til útlendsk ítróttafólk.



## Sveinur um mat

- Eg eti tað, sum eg fái. Mær dámar best føroyskan mat og kjøtfrikadellur. Ræst kjøt er tað besta og havhestur av og á.

# yvir teimum øllum



*Hondbóltsfamiljan Justinussen: Frá vinstur Leivur, Rebekka og Sveinur. Aftanafyri stendur pápin Jústines. Tey eru øll berandi kreftir hjá StÍF. Leivur, Sveinur og Rebekka spæla øll, meðan Jústines er venjari Mynd: Høgni Thomsen*

sigur, at eg eri ov heimføðissligur, sigur Sveinur við einum smíli.

– Tað er eisini sera hart at fara av landinum fyri einans at spæla hondbólt. Tað kann vera einsligt, sigur Jústines.

Sveinur hevði tó umhugsað tað, um hann fekk enn eitt tilboð um at gerast yrkisleikari.

– Eg hevði kanska sæð uppá tað við øðrvísi brillum í dag, sigur Sveinur og opnar soleiðis dyrnar fyri einum møguligum tilboði frá einum útlendskum felagi.

### Rebekka mansverd frá fyrsta degi

Rebekka er einans 19 ár, men hon hevur í nógv ár verið ein av bestu leikarunum hjá StÍF-kvinnunum. Longu sum ung var hon høvdið longri enn allar hinar, og hon hevur altíð skotið óvanliga hart og væl.

– Eg kom at spæla longu sum heilt ung. Tað var meira av neyð enn nakað annað, tí at tær manglaðu so nógvar leikarar, sigur Rebekka.

Hon hevur, hóast sín unga aldur, fleiri ferðir upplivað at verða mansvard. Millum annað í fyrru hálvfinaluni móti Stjørnuni, har ið Stjørnan mansvardi hana mestsum frá byrjan. Rebekka viðurkennir, at tað er ikki stuttligt at verða mansvard ofta, tá ið hon enn stendur í menning.

– Tey fyrstu árini hugsaði eg ikki so nógv um tað. Tað var deiligt at fáa ein steðg í dystinum, sigur Rebekka flennandi.

– Í seinastuni haldi eg tað tó vera rættiliga keðiligt, tí at tú verður púra tikin burturúr spælinum. Tað er eitt sindur ómotiverandi.

Hini eru øll samd í Rebekku.

– Mansverja eigur at vera síðsta vápnið hjá einum venjarar. Tí er tað ikki í lagið, at ein 19 ára gomul genta verður mansvard allan dystin, sigur Jústines.

### Hondbólturin er ítriv

Hóast evnini eru eyðsýnd, hava tey trý ongantíð droymt um at gerast yrkisleikarar.

- Eg spæli, tí at eg havi hug, og eg gevist, tá ið eg ikki tími meira, sigur Leivur.

- Vit hava ongantíð hugt nakað serligt eftir hondbólti í sjónvarpinum. Tí hava eg ongantíð ordiliga havt dreymin um at gerast yrkisleikari, sigur Rebekka, sum hevur verið á hondbóltseftirskúla í Danmark. Hon gavst tó, tí at hon hevði ikki hjartað við.

- Eg fór niður, tí at øll onnur søgdu, at eg skuldi fara at royna hondbóltsevnini. Eg vónaði ikki, at eg slapp inn, men tað gjørdi eg. Eg gavst, tí at tað var ikki eg. Eg eri ov føroysk, sigur hon við einum skeivum smíli.

Tey eru øll samd um, at StÍF verður einasta liðið, sum tey fara at spæla fyri í Føroyum.

Jústines er longu byrjaður at venja abbasonin Bjarna, og hann er longu grovur, hóast hann ikki er farin í skúla enn.

Tað verður spennandi at síggja, um hann eisini kann gerast ein av fremstu hondbóltsleikarum í landinum.

## Fakta

**Jústines**, 52 ár – Arbeiðir á Havsbrún sum fíggjarleiðari
**Leivur**, 26 ár – Maskinskúla-næmingur – eigur sonin Bjarna við Sólvá í Selvindi
**Sveinur**, 23 ár – Arbeiðir hjá Tryggingarfelagnum Føroyar
**Rebekka**, 19 ár – Gongur á studentaskúlanum á Kambsdali